# Spillvatnsætlan
# -Hov´s kommuna

09.11.2010

Revisión nr. 01: 04.01.11



ANLEGGSVERKFRØÐI

## Innihaldsyvirlit

1.0 Almenn lýsing av kloakkviðurskiftunum í Hov´s kommunu ........ 1
2.0 Fyritreytir ........ 1
3.0 Lýsing av verandi kloakkskipan ........ 1
4.0 Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini. ........ 3
5.0 Verkætlan fyri ætlaðu kloakkskipanini ........ 5
6.0 Eftirlit og røkt av spillvatnsskipanini ........ 7
7.0 Fólkatal og ídnaður framyvir ........ 7
8.0 Raðfesting av arbeiðnum í sambandi við spillvatnsætlanini ........ 7

<u>Fylgiskjøl</u>

Fylgiskjal 1 – Rottangayvrilit.
Fylgiskjal 2 – Yvirlitsplanur, tekning nr. 01.
Fylgiskjal 3 – Spillvatnsnøgd.
Fylgiskjal 4 – Streymviðurskifti.
Fylgiskjal 5 – Kostnaðarmeting.

## 1.0 Almenn lýsing av kloakkviðurskiftunum í Hov´s kommunu

Hov´s kommuna liggur saman við einum parti av Porkeris kommunu við Hov´s fjørð.
Kloakkin í kommununi er rættuliga nýggj. Elsti parturin er frá fyrst í 1980´unum, meðan nýggjastu leiðingarnar eru gjørdar fyri fáaum árum síðani. Tað ið manglar, er í høvuðsheitum at leggja kloakkleiðingar frá Brekkuvegi og við Leivsgarð. Her rennur spillvatnið í áir og veitir.
Øll húsini í kommununi hava rottanga.
Upplandið er stórt, fjørðurin er stuttur og nógvur uppgangur er, tá ið illveður er. Tí er sannlíkt at stór vatnútskifting er á fjørðinum.

## 2.0 Fyritreytir

Spillvatnsætlanin verður gjørd samsvarandi Kunngerð nr. 111 frá 7. September 2009 um spillvatn, við niðanfyri standandi fyritreytum sum grundarlag:

- Korttilfar og skrásetingar frá Hovs kommunu
- Egnar skrásetingar
- DS 432
- DS 440
- Havið. ISBN: 99918-0-248-7

## 3.0 Lýsing av verandi kloakkskipan

Allar kloakkleiðingarnar eru úr PVC og tískil rættuliga nýggjar, elstu kloakkirnar eru til húsini fram við Traðarvegi, Heygavegi og Við Grind , hesar eru frá fyrst í 80´unum. Í hesa høvuðsleiðing er nýggi skúladepilin í Porkeri knýttur í.
Kloakkin fram við Garðsvegi er gjørd fyrst í 90´unum. Nýggjastu kloakkirnar eru fram við Brúarvegi, hesin parturin er gjørdur í 2003. Brekkuvegur og Leivsgarður er einasti partur í bygdini, har ið tað manglar at leggja kloakkleiðingar út á sjógv.
Øll hús har fólk býr, hava rottanga, sí fylgiskjal 1. Tað eru 2 hús ið eru fyrrverandi handlar, har eingir rottangar eru, húsini verða ikki brúkt sum bústaðir. Húsini eru víst á fylgiskjali nr. 2.
Kloakkin er samlað í 5 útrenningar, ið renna út á sjógv (til deils í veit við matr. nr. 66a).
Umframt 2 útrenningar, ið renn út í veit við matr. nr. 29b og frá fólkaskúlanum. Hesar eru vístar á fylgiskjali 2.



Mynd 1, útrenning nr. 1.



Mynd 2, útrenning nr. 2

Mynd nr. 1 vísir útrenning frá Brúarvegi, útrenning nr.1. Hendan er løgd oman í fjørðuna og síðan út á sjógv. Frá sjóvarmálanum og út á sjógv, er útrenningin umstoypt.

Mynd nr. 2 vísir útrenning nr. 2. Hendan er gjørd á sama hátt sum útrenning nr.1, við tað at rørið er umstoypt frá sjóvarmálanum og út á sjógv.
Orsaka av nógvum uppgangi er tilfarið ið upprunaliga var lagt uttan um rørini (Grót ið var lagt frá sjóvarmálanum og niðan móti bønum), við útrenning nr. 1, skola burtur. Hetta er bert kosmetiskur mangul. Útrenning nr. 2 er brotin orsaka av illveðri og má umvælast.



Mynd 3, útrenning frá matr. nr. 15a




Mynd 4, útrenning nr. 3



Mynd 4.1, nærmynd av útrenning nr. 1



Mynd 4.2, útrenning frá fólkaskúlanum

Í Hovi eru 121 fólk skrásett at búgva í kommununi. Fólkatalið í Hovi er seinastu 25 árini fallið við umleið 20 %. Fólkatalið sær út til at fylgja búskapargongdini í landinum, við tað at fólkatalið vaks frá ár 2000 til 2005. Síðan er fólkatalið minkað aftur til sama støði sum ár 2000. Tí er væl hugsandi at fólkatalið fer at økjast tá ið uppgangstíðir verða aftur. Í november 2010 er fólkatalið smbr. uppteljing 119 fólk.




| | 1985 | 1990 | 1995 | 2000 | 2005 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Hov | 153 | 165 | 143 | 119 | 131 | 121 |

Figur 1: Fólkatal í Hovi

Einki vinnuvirki er í Hovi. Eitt savn/cafe er á kaiini, 1 persónur (parttíð) tekur sær av hesum. Í skúlanum í Hovi, ganga 2 næmingar umframt lærarin.
Spillvatnið frá Miðnáms- og Heilsuskúlanum, ið liggja í Porkeris kommunu, eru bundin í kloakkleiðingina í Hovi. Í skúlanum eru (umleið) 30 lærarar og 200 næmingar.

Spillvatnið stavar, út frá omanfyri standandi útgreining, bert frá vanligum húsarhaldum og frá Miðnáms- og Heilsuskúlanum.

## 4.0 Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini.

Samlaða spillvatnsmongdin kann ásetast smbr. DS440 til umleið 40 $m^3$/samdøgur, sí fylgiskjal 3, fyri útgreining av tølum.

Harav er mongdin av:

| | |
|---|---|
| $BI_5$ | 12,0 kg/samdøgur |
| N | 2,6 kg/samdøgur |
| P | 0,5 kg/samdøgur |

Har ið:
$BI_5$ er biokemiska iltnýtslan
N er nitrogen
P er fosfor

Samlaða upplandið, har ið regn rennur oman í Hovsfjørð, er umleið 16,5 $km^2$. Støddin á fjørðinum er umleið 3,2 $km^2$, mynd 5.




Mynd 5. Regnøkið

Regnmongdin við vitan í Akrabergi, er smbr. DMI 884 mm/árið.

Regnmongdin kann roknast sum: Q = C*i*A

Har ið: C er 0,6 fyri hellu/fjall og 1,0 fyri hav/vatn
i er regnmongd
A er stødd av upplandi

Regnmongdin frá upplandinum verður út frá omanfyristandandi: 38.000 $m^3$/samdøgur
Regnmongdin í fjørðin: 7.800 $m^3$/samdøgur

Samlaða vatnnøgdin, sum í meðal verður leidd oman í fjørðin, er sostatt umleið 45.800 $m^3$/samdøgur.

Feskt vatn hevur umleið 14 g/ilt/$m^3$, tá er ikki roknað við iltingini tá ið vatnið rennur gjøgnum áirnar. Frá feskvatninum verða tí umleið 642 kg/ilt/samdøgur leidd út í fjørðin. Av hesum brúkar spillvatni 12/642, ella knappliga 2 % av tilførdu iltmongdini frá feska vatninum. Fyri laks o.t. skal iltmongdin í fjørðinum ikki verða lægri enn umleið 6 g/$m^3$ sjógv.

Omanfyri standandi tøl eru ein einføld uppstilling við meðaltølum og byggja á normar og metingar. Hesi skulu tí takast við fyrivarni, men iltnýtslan frá spillvatninum er lítil sæð í mun til hvussu nógv ilt verður útleidd frá feskvatninum.
Eiheldur er hædd tikin fyri at feska vatnið saman við Sjógvinum verður til eitt “Brakkvatnslag”, t.e. ein blanding millum feskvatn og sjógv.

Eingin sjónlig tekin eru uppá dálking frá útrenningunum, eiheldur við útrenningarstøðini.
Sjónlig tekin uppá nitratdálking:

- Óklárt vatn/sjógvur

- Iltsvinn (og harvið einki livandi)
- Alguvøkstur, kann síggjast sum grønligur/gráur/brúnur litur á sjónum.

Hovsfjørður er umleið 2,5 km til longdar og tískil ein av teimum styttru firðunum í Føroyum. Fjørðurin er ikki sum t.d. Skálafjørðurin ein “Gáttfjørður”, smbr. “Havið”. Botnurin á fjørðinum hellur javnt út á hav.




Mynd 6. Botnkurvar av fjørðinum.

Tað er rættuliga nógvur uppgangur í Hovi, tá ið tað er ringt veður. Útrenning nr. 02, hevur skaða orsaka av illlveðri.
Størsti munurin á flóð og fjørðu er umleið 1,3 m.
Streymviðurskiftini fyri Hovsfjørð og Trongisvág, eru víst á fylgiskjali nr. 4

## 5.0 Verkætlan fyri ætlaðu kloakkskipanini

Kommunan er í ferð við at samlað allar kloakkleiðingarnar, soleiðis at hesar renna beinleiðis út á sjógv. Øll húsini í kommununi hava rottanga.
Ætlanin er at samlað útrenningar í 3 størri útleiðingarstøð. Hæddin á hesum útleiðingarstøðum skal, um tað er gjørligt at gera, leggjast minst 1 metur undir hægstu fjøru. Við útrenning nr. 2 og 3, ber til uttan stórvegis trupulleikar at leggja útrenningina minst 1 metur undir hægstu fjørðu. Útrenning nr. 3, ið er gjørd/umstoypt, verður trupult at fáa broytta. Kommunan fer tí at biðja um at fáa undantak frá hesum kravinum fyri útrenning nr. 1, við niðanfyri standandi grundgevingum:

- Tá ið útrenningin var gjørd, var tað sera trupult at fáa nøktandi festing í botnin út fyri útrenningina.
- Útrenningin var gjørd í 2003 og sæst einki til nakað til spillvatn ella uppsavnan frá útrenningini. Sí mynd 4.1.
- Spillvatnsnøgdin er lítil, umleið 10 pe.
- Vatnútskiftið á fjørðinum er gott.

Á mynd nr. 7 er víst við magenta littari striku, hvar markið er millum kloakkirnar/útrenningarnar og hvar útrenningarnar eru.

Við áseting av spillvatnsnøgd verður roknað við 202 PE. Tá eru Miðnámsskúlin og savn/cafe íroknað. Hesi tøl er komið fram til á henda hátt.

- Spillvatnsnøgdin er ásett út frá faktiska fólkatalinum. T.e. hvussu nógv fólk búgva í hvørjum bústaði.
- Spillvatn frá Miðnámsskúlanum verður lagdur afturat fólkatalinum í Hovi. T.e. øll ið ganga á skúlanum eru ikki búsitandi í Hovi. Hvør lærari og næmingur telur 1/3 pe.
- Persónsbelastningurin frá fólkaskúlanum verður ikki lagdur afturat samlaðu spillvatnsnøgdini. T.e. lærari og næmingar búgva í Hovi. Hvør persónur telur 1/3 pe.
- Persónsbelastningurin í savninum/cafeiini á kaiini verður ásettur til 5 fólk, og verður hetta lagt afturat spillvatnsmongdini. Hesi telja ½ pe fyri hvønn persón.
- Roknað er við at tað bert eru íbúgvar í Hovi, ið brúka kirkjuna og missiónshúsið. Tað er tí ikki rokna spillvatni frá hesum.

Rør verða dimensionerað smbr. DS 432

Sum mynd 7 vísir, so eru 2 æliøkir, ið liggja umleið mitt á fjørðinum. Tað ber ikki til við rímiligheit, at leggja útleiðingarnar soleiðis, at æliøkini ikki verða ávvirkað av spillvatninum. Men sum eftirfylgjandi meting vísir, so er ávvirkanin avmarka.




Mynd 7: Útrenningarstøð (nýggj mynd)

Við omanfyri ásettu fyritreytum, er spillvatnsnøgdin við útrenning nr.:
1: 10 pe
2: 62 pe
3: 130 pe

Í alt er samlaða útlátið gott 200 pe.

Smbr. "Havið" er fekstvatnsparturin í "Brakkvatnslagnum" millum 1 og 3 % í Føroyum. Sum víst á undir punkt 4, verður í meðal tilført knapt 46.000 $m^3$/døgn av feskum vatni í fjørðin. Út frá hesum ber til at meta um hæddina á Brakkvatnslagnum, til at verða:

Við 1 % feskum vatni: 46.000 $m^3$/0,01 * 1/3,2$e^6$ $m^2$ = 1,4 m og "Brakkvatnsnøgdin" 4,6 mió. $m^3$. Um fekstvatnsnøgdin er 3 %, er hæddin 0,5 m og "Brakkvatnsnøgdin" 1,5 mió. $m^3$. Hetta er tann vatnnøgdin, ið roknast kann við verður útskift á fjørðinum, orsaka av tilførdum regnvatni.

Frá útrenningunum er er útlátið av:

| | |
|---|---|
| N | 2,6 kg/samdøgur |
| P | 0,5 kg/samdøgur |

Um vit áseta evnistyngdina á sjónum, til 1 tons/$m^3$, er dálkingin á "Brakkvatninum" millum:

| | |
|---|---|
| N | 2,6 / 4,6e6 ella 1,5e6 = ~0,5 ella 2 ppm |
| P | 0,5 / 4,6e6 ella 1,5e6 = ~0,1 ella 0,3 ppm |

Talan er tí um rættuliga smáar nøgdir. Sjálvt um hetta bert eru yvirslagsútrokningar og tí kunnu verða óneyvar, er talan um smá tøl.

Hov´s fjørður er ikki góðkendur sum hvalvág.

Vegvatnið ið rennur út í veitir frá vegbrunnum, er vanligt vegvatn. Ætlanin er ikki at leiða hetta út á sjógv, av tí at eingin serlig dálkingarkelda er frá hesum.

## 6.0 Eftirlit og røkt av spillvatnsskipanini

Kommunan hevur einki fólk í starvi til at taka sær av kloakkini. Seinasta íløgan kommunan hevur gjørt var í 2003, tá ið kloakkin var løgd til húsini fram við Brúarvegi. Síðan hevur kommuna einki brúkt uppá íløgur til kloakkina. Til raksturin hevur kommuna seinastu árini avsett 10.000 kr. Hetta er eisini tað ið er avsett fyri 2011. Rottangarnir verða tømdir av IRF, 1 ferð um árið.

## 7.0 Fólkatal og ídnaður framyvir

Fólkatalið í Hovi er, sum í flestu økjum uttanfyri Tórshavn, eisini minkað seinastu árini. Væntandi er, at í besta føri fer bygdin ikki at minka, men at ein minni vøkstur í fólkatalinum verður í bygdini.
Kommunan hevur fyri stuttum selt 3 grundstykki í útstykkingini Við Grind. Tað kann tí roknast við at spillvatnið við útrenning nr. 3 økist við upp til 15 pe frá hesum húsum.

Fyri vinnuna er ikki hugsandi at nøkur stórvegis broyting verður í nærmastu framtíð. Eiheldur hevur kommunan nakra ídnaðarætlan fyri framman.

## 8.0 Raðfesting av arbeiðnum í sambandi við spillvatnsætlanini

Samlaði kostnaðurin fyri at útinna spillvatnsætlanina verður umleið 0,9 til 1,0 mió. kr. Kostnaðurin er útgreinaður í fyligskjali 5.
Ætlanin er at brúka 300.000 kr árliga í 2012 og 2013 og restina í 2014. bytt sundur sum víst á myndini niðanfyri.




Mynd 8: Tíðarætlan

Sundurbýtingin av spillvatnsætlanini er grunda á, at spillvatnsnøgdin frá útrenning nr. 3 er størri enn spillvatnsnøgdin við útrenning nr. 2. Útrenning nr. 1 er ikki tikin við í ætlanina, at tí at tað bert er kosmetiskur mangul/skaði á hesi.

**Fylgiskjal 1**

2010 11:20 FAX +298 414247 IRF Slammtænastan 001

# Rottangaskráseting

Útskrivað 12.05.2010

## Hovs Kommuna

Umráði A003 - 960 Hov

| Persónsnavn | Matr. | Tanga nr. | Telefon | Slag av tanga | Fjarst. | Virkisslag | Aktivur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Heimamissiónin | 75 | 3748 | 0 | Glastrevjarottangi | 3,00 | Privat | Ja |
| Fríðbjørg Hammer | 37b | 3749 | 373355 | Glastrevjarottangi | 18,00 | Privat | Ja |
| Súsanna Smidt Hammer | 37c | 3750 | 374290 | Betongrottangi | 15,00 | Privat | Ja |
| Poul J. P. Midjord | 66f | 3751 | 373322 | Glastrevjarottangi | 0,00 | Handil | Nei |
| Poul J. P. Midjord | 66g | 3752 | 373322 | Betongrottangi | 12,00 | Privat | Ja |
| Hans Jørgen Remmer | 66l | 3753 | 373587 | Betongrottangi | 13,00 | Privat | Ja |
| Ditlev Hammer | 66h | 3754 | 373689 | Glastrevjarottangi | 6,00 | Privat | Ja |
| Ninna Kristina Jespersen | 66l | 3755 | 373655 | Glastrevjarottangi | 6,00 | Privat | Ja |
| Bergljót H.Bertholdsen | 6d | 3756 | 373367 | Glastrevjarottangi | 20,00 | Privat | Ja |
| Klæmint Johannesen | 61b | 3758 | 373347 | Glastrevjarottangi | 13,00 | Privat | Ja |
| Karin Johansen | 45a | 3759 | 373326 | Glastrevjarottangi | 4,00 | Privat | Ja |
| Johan Vilhelm Chr. Mortensen | 53 | 3760 | 373332 | Glastrevjarottangi | 17,00 | Privat | Ja |
| Hovs Kirkja | 70 | 4854 | 373324 | Glastrevjarottangi | 15,00 | Kirkja | Ja |

5 2010 11:20 FAX +298 414247 IRF Slammtænastan 002

# Rottangaskráseting

Útskrivað 12.05.2010

## Hovs Kommuna

Umráði A001 - 960 Hov

| Persónsnavn | Matr. | Tanga nr. | Telefon | Slag av tanga | Fjarst. | Virkisslag | Aktivur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eyðfin Joensen | 58b | 3714 | 344731 | Betongrottangi | 13,00 | Privat | Ja |
| Eyðfin Joensen | 14b | 3715 | 374731 | Betongrottangi | 15,00 | Privat | Ja |
| Ása Hovgaard | 2b | 3716 | 373656 | Betongrottangi | 16,00 | Privat | Ja |
| Jónleif Hammer | 19b | 3717 | 0 | Betongrottangi | 16,00 | Privat | Ja |
| Gert Jespersen | 23 | 3718 | | Betongrottangi | 13,00 | Privat | Ja |
| Helena Jespersen | 32b | 3719 | 0 | Ókent | 0,00 | Privat | Ja |
| Jónsvein Hovgaard | 13b | 3720 | 373685 | Betongrottangi | 2,00 | Privat | Ja |
| Ditlev H. E. Hammer | 21a | 3721 | 373689 | Ókent | 0,00 | Privat | Nei |
| Janus Hammer | 60 | 3722 | 373950 | Glastrevjarottangi | 7,00 | Privat | Ja |
| Janus Hammer | 34 | 3723 | | Ókent | 0,00 | Privat | Ja |
| Annika Borg | 24d | 3724 | | Glastrevjarottangi | 10,00 | Privat | Ja |
| Jona Maria Petrina Midjord | 10c | 3725 | 0 | Betongrottangi | 12,00 | Privat | Ja |
| Karin Johansen | 45b | 3726 | 373125 | Ókent | 0,00 | Privat | Ja |
| Jacob Tausen | 31b | 3727 | 373632 | Glastrevjarottangi | 7,00 | Privat | Ja |
| Helena Jespersen | 32a | 3728 | | Ókent | 0,00 | Privat | Nei |
| Kristina Berg | 66m | 3729 | 317226 | Ókent | 0,00 | Privat | Ja |

**Fylgiskjal 1**

# *Rottangaskráseting*

Útskrivað 12.05.2010

## Hovs Kommuna

### Umráði A002 - 960 Hov

| Persónsnavn | Matr. | Tanga nr. | Telefon | Slag av tanga | Fjarst. | Virkisslag | Aktivur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Katrin Hammer | 52 | 3730 | | Betongrottangi | 1,00 | Privat | Ja |
| Torkild Hovsdal | 51b | 3731 | 374115 | Betongrottangi | 7,00 | Privat | Ja |
| Poulina Jensina Jespersen | 49a | 3732 | 373735 | Betongrottangi | 2,00 | Privat | Ja |
| Arnfinn Hammer | 22 | 3733 | 0 | Glastrevjarottangi | 4,00 | Privat | Ja |
| Kristianna Joensen | 56 | 3734 | 373731 | Betongrottangi | 15,00 | Privat | Ja |
| Sjúrður Eysturtún Tausen | 68b | 3735 | 372129 | Betongrottangi | 1,00 | Privat | Ja |
| Finnbjørn Hovsgarð | 69 | 3736 | 0 | Glastrevjarottangi | 1,00 | Privat | Ja |
| Bjarki Hovgaard | 62 | 3737 | 373497 | Glastrevjarottangi | 1,00 | Privat | Ja |
| Thorsten Thorsen | 57b | 3738 | 0 | Betongrottangi | 4,00 | Privat | Ja |
| Hjørleif Luid | 41b | 3739 | | Betongrottangi | 7,00 | Privat | Ja |
| Eydna Danielsen | 59 | 3740 | 373732 | Glastrevjarottangi | 4,00 | Privat | Ja |
| Hentzar Petersen | 33a | 3741 | 573325 | Betongrottangi | 15,00 | Privat | Ja |
| Majken Jósveinsdóttir | 1c | 3742 | 373262 | Glastrevjarottangi | 2,00 | Privat | Ja |
| Erling Petersen | 1d | 3743 | 373834 | Glastrevjarottangi | 1,00 | Privat | Ja |
| Adina Olsen | 15a | 3744 | 313895 | Betongrottangi | 6,00 | Privat | Ja |
| Hovs Kommuna | 66t | 3745 | 373657 | Betongrottangi | 50,00 | Kommunalur Stovn | Ja |
| Leivur Ryggshamar | 29b | 3746 | 0 | Glastrevjarottangi | 30,00 | Privat | Ja |

5 2010 11:21 FAX +298 414247 IRF Slammtænastan 004

# *Rottangaskráseting*

Útskrivað 12.05.2010

## Hovs Kommuna

### Umráði A004 - 960 Hov

| Persónsnavn | Matr. | Tanga nr. | Telefon | Slag av tanga | Fjarst. | Virkisslag | Aktivur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Súni Mortensen | 165e | 3761 | 373698 | Glastrevjarottangi | 8,00 | Privat | Ja |
| Jónleivur Hammer | 165g | 3762 | | Glastrevjarottangi | 35,00 | Privat | Ja |
| Hjalti Jensson | 165h | 3763 | 373942 | Glastrevjarottangi | 20,00 | Privat | Ja |
| Jón Midjord | 66o | 3764 | 0 | Glastrevjarottangi | 35,00 | Privat | Ja |
| Niels Jespersen | 66n | 3765 | 373412 | Glastrevjarottangi | 28,00 | Privat | Ja |
| Ólavur Hovsgarð | 28c | 3766 | 0 | Glastrevjarottangi | 28,00 | Privat | Ja |
| Josvein Petersen | 80 | 3767 | 373509 | Betongrottangi | 16,00 | Privat | Ja |
| Thomas Pauli Joensen | 51d | 3768 | 0 | Glastrevjarottangi | 40,00 | Privat | Ja |
| Niels Arne Tausen | 15d | 3769 | 373803 | Glastrevjarottangi | 33,00 | Privat | Ja |
| Ásbjørn Berg | 147 | 3770 | 373832 | Glastrevjarottangi | 12,00 | Privat | Ja |
| LC-Suðuroy | 72a | 3771 | | Betongrottangi | 4,00 | Samkomuhús | Ja |
| Delmar Tausen | 71c | 3772 | 373804 | Glastrevjarottangi | 2,00 | Privat | Ja |
| Sólbjørg Tausen | 71a | 3773 | 373839 | Glastrevjarottangi | 3,00 | Privat | Ja |
| Odmar P. Petersen | 66b | 3774 | 373475 | Glastrevjarottangi | 10,00 | Privat | Ja |
| Jenny Petersen | 66k | 3775 | | Betongrottangi | 15,00 | Privat | Ja |
| Sonni Zachariasen | 4d | 3776 | 373597 | Glastrevjarottangi | 5,00 | Privat | Ja |
| Lasse Jensen | 35a | 3777 | 374406 | Glastrevjarottangi | 28,00 | Privat | Ja |